HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúar til Heilsumálaráðið

**Starvið**
Søkt verður eftir tveimum fulltrúum til fast starv í Heilsumálaráðnum.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjari hevur útbúgving frá hægri lærustovni innan løgfrøði, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umráðandi er, at tann, ið settur verður:

- hevur góð samstarvsevni,
- hevur góð greiningarevni,
- hevur góðar samskiftisførleikar í føroyskum og donskum, bæði munnliga og skrivliga,
- hevur politiskt tev,
- er tænastuhugað/ur, fleksibul og miðvís/ur,
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Umsøkjarar skulu eisini hava evni til at hugsa strategiskt og samskifta á ymiskum stigum.

**Løn og setanartreytir**
Talan er um fulltíðarstørv, ið verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið fevnir um øll stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra. Roknast kann við, at arbeiðstíðin stundum fellur uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Nærri kunning um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Turid Arge, aðalstjóra, á tel. 304050 ella umvegis teldupost til turid.arge@hmr.fo at fáa nærri upplýsingar.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli o.ø. skulu sendast til:

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

ella við telduposti til **hmr@hmr.fo**

Umsóknir skulu vera Heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **24. januar 2022, kl. 12.00**.

Starvið verður sett frá 1. mars ella skjótast til ber. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Tú kanst lesa meira um málsøkið, sum Heilsumálaráðið umsitur, á www.hmr.fo